## … Jól við ringari samvitsku



– Tað er sera týdningarmikið at tosa við børnini – serliga á jólum. Tí smábørn hava eisini kenslur og tankar um skilnaðin, sigur Vivian Unadóttir, sum sjálv hevur fráskild foreldur

> – ..tað er líkasum ikki pláss fyri tárum á jólum

brádliga er burtur. Og tað er sera týdningarmikið at foreldrini viðurkenna tað – eisini hóast tað er ringt, staðfestir hon.

Vivian veit, at foreldrini altíð hava viljað gjørt sítt besta. Men hon veit eisini, at tey hava verið í eini ringari støðu.

- Tað vóru so fá fólk, ið blivu skild tá, so tey hava kanska eisini kent seg einsamøll og ikki heilt vitað, hvussu tey skuldu fyrihalda seg. So leingi sum eg einki segði, so hava tey helst hildið, at alt var ókey. Og tí hava tey kanska ikki viljað spurt inn til kenslur og tankar hjá mær.

> – Tá eg sá hann koma, leyp eg út, og eg minnist, at eg leyg fyri honum. Eg segði, at mamma hevði gjørt rís a' la mandel, og at hon ordiliga gjarna vildi hava, at hann eisini kom inn at fáa sær

- Eg minnist, at eg ofta var øgiliga ómøgulig og treisk á jólum. Eg vildi bara hava tey at varðnast meg og síggja, at eg var kedd. Eg vildi hava tey at tosa við meg og halda um meg. Men tað bleiv sum oftast misskilt, og eg bleiv bara til ta treisku gentuna, sum oyðilegði góða stemningin. Og so varð eg enn meiri kedd aftaná.

### Fantastiskar bonusfamiljur

Tá prátið fellur á nýggju familjurnar, sum brádliga komu inn í lívið við nýggju makunum hjá foreldrunum, lýsir Vivian upp.

- Har havi eg verið fantastiska heldig. Tí tey hava øll verið so góð við meg, og eg havi følt meg elskaða og ynskta frá fyrsta degi, sigur Vivian og vísir á, at nógv skilnaðarbørn ikki hava tað gott við nýggju familjunum.

Hon heldur fram og sigur, at hon heldur ongantíð hevur merkt mismun á sær og yngru systkjunum. Og tað er hon sera takksom fyri.

- Tað er ringt at koma inn í eina sundurrivna familju, men tey hava øll gjørt alt rætt. Bæði teir nýggju makarnir, men eisini teirra familjur. Tey hava altíð havt opnar favnar, og eg havi altíð kent meg sum ein náttúrligan part av lívinum hjá teimum øllum, greiðir Vivian frá.

### Egna familju

Vivian hevur í áravís hildið saman við sjeikinum Regini, og á jólum í fjør fingu tey dóttrina Ró.

Vivian sigur, at nú hon sjálv er blivin mamma, hugsar hon øðrvísi um jólini. Nú kann hon við góðari samvitsku leggja jólini til rættis, sum hon sjálv ynskir tað, tí nú má hon fyrst og fremst hugsa um sína egnu lítlu familju.

Trýstið sum hon altíð hevur kent um jóltíðir, er stórt sæð horvið nú, og sum hon sigur: nú nýtist mær ikki at rættvísgera valini, eg taki um jólini.

- Nú gleði eg meg til jóla. Eg gleði meg til sjálv at skapa tað góða og trygga, sum eg altíð havi saknað. Og eg vil gera alt, fyri at dóttir mín ongantíð skal uppliva somu skuldarkenslurna á jólum, sum eg.

---

# Børnini í fokus

**Tá eitt par fer frá hvørjum øðrum, merkja børnini eisini sviðan. Og serliga á jólum verða børnini ofta sett í truplar støður. Her eru nøkur góð ráð um hvussu jólini gerast góð –eisini fyri børn við fráskildum foreldrum**

### GÓÐ RÁÐ UM JÓLINI

*Lagt til rættis: Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

1 Haldið jólaaftan saman, um tit kunnu gera tað við gleði.

2 Um tit halda jól hvør sær, lat so barnið fáa fleiri dagar á rað har, sum tað heldur jólaaftan. Barnið hevur eisini tørv á at slappa av og njóta jólagávurnar. Og minnist til, at jólaferian eisini er ferian hjá barninum.

3 Hugsið tykkum væl um, áðrenn tit gera av at halda jólaaftan tvær ferðir. Tað stressar barnið og tekur serliga dámin av jólaaftan, um tað fyrst skal halda jólaaftan saman við pápanum og dagin eftir hjá mammuni ella øvugt. Eitt gott hugskot er at gera nýggjar traditiónir saman við barninum, um tit ikki skulu vera saman jólaaftan.

4 Avtalið í góðari tíð hvar og hvussu barnið skal halda jólaaftan, og fortel barninum tað langt undan jólum.

5 Gevið eisini restini av familjuni boð um, hvar barnið verður á jólum. Lat ommur og abbar, sum ikki vera saman við barninum jólaaftan, vita, at tey eru vælkomin at skapa aðrar traditiónir saman við børnunum. Jólini eru meiri enn bert jólaaftan, og árið hevur harumframt 364 aðrar dagar.

6 Best er at lata barnið halda jól har, ið tað longu hevur sterkar traditiónir. Eisini hóast tað merkir, at tú ikki verður við. Og minst til: tað er ikki synd í tær. Í øllum førum ikki so leingi barnið sær ella hoyrir.

7 Lati vera at kappast innanhýsis móti gamla makanum um at geva flottastu gávuna ella at halda tey bestu jólini.

8 Tað eru foreldrini, ið eiga ábyrgdina av jólunum. Barnið skal undir ongum umstøðum noyðast at velja ímillum mammu og pápa.

9 Samanførd børn og biologisk børn skulu hava somu treytir og sama kærleika –eisini jólaaftan.

*Kelda: Børns Vilkår, Statsforvaltningen Sjælland og psykolog Lene Dam Petersen.*